*– Hetta hjálpir ikki einum flokki, ið sigur seg verja tey kristnu virðini*

*konservativur stovnsleiðari í USA*

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK
TLF 341800

# ÚTLOND

# Sex-gølan í Kongressini kann kosta Bush dýrt

**Ótespiligu teldubrøvini hjá Mark Foley kunnu kosta republikanarunum meirilutan í Umboðsmannatinginum og Senatinum**



*Demokratarnir krevja, at Dennis Hastert skal leggja frá sær sum formaður í Umboðsmannatinginum, tí hann visti um teldubrøvini uttan at rætta hond frá síðu*

Í síðstu viku viðgekk republikanski politikarin Mark Foley, at hann hevði sent ørindadreingjunum í Kongressini teldubrøv við seksuellum innihaldi. Samstundis boðaði hann frá, at hann tók seg úr umboðsmannatinginum.

Men tann demokratiska andstøðan luktar blóð, tí í næsta mánað verður val, og sexgølan kann lættliga hava við sær, at republikanararnir missa meirilutan bæði í Umboðsmannatinginum og Senatinum.

Tað hevur ikki bøtt um støðuna hjá republikanarunum, at formaðurteirra í Umboðsmannatinginum, Dennis Hastert, hevur viðgingið, at hann visti um tey ótespiligu teldubrøvini hjá floksfelaganum fyri fleiri mánaðum síðani, og at hann einki gjørdi við málið. Nú krevja demokratarnir, at hann skal leggja frá sær, men Dennis Hastert hevur valt at seta hart ímóti hørðum.

-Eg fari ongan veg, segði hann í gjár.



*-Eg vamlist og eri sera vónbrotin, sigur George W. Bush, forseti, um avdúkingarnar*

### Harður ágangur

Politiskir eygleiðarar í Washington siga, at republikanski flokkurin kann lættliga tapa valið tann 7. november. Flokkurin hevur verið fyri hørðum ágangi í seinastuni. Fyrst kunngjørdu fregnartænasturnar, at tað gongur als ikki so væl í Irak, sum stjórnin vil vera við, og í vikuni kom tann kendi rithøvundurin Bob Woodwaad við enn einar av sínum avdúkandi bókum. Hesaferð loeggur hann George W. Bush, forseta og stjórnina undir at dylja sannleikan um Irak fyri amerikanska fólkinum. Oman á hetta koma so teldubrøvini hjá Mark Foley og tað, at Dennis Hastert visti um tey uttan at rætta hond frá síðu.

Eygleiðarar siga, at tann stóri spurningurin er, hvat teir evangeliskt kristnu kjarnuveljararnir hjá republikanarunum siga um avdúkingarnar. Velja fleiri teirra at sita við hús valdagin fyri at vísa sína misnøgd, kann tað kosta republikanarunum dýrt.

- Hetta hjálpir ikki einum flokki, sum sigur seg verja tey kristnu virðini, sigur formaðurin í konservativa felagsskapinum Family Research Council við The Washington Post.

Joy Gaylord, sum var ráðgevi hjá fyrrverandi republikanska leiðaranum Newt Gingrich, sigur, at Foley-gølan kann lættliga tryggja demokratunum sigurin tann 7. november.

### FBI kannar málið

Samveldisløgreglan FBI kunngjørdi í gjár, at hon er farin undir at kanna málið um teldubrøvini hjá Mark Foley. Í fyrsta lagi skulu løgreglumenninir lesa teldubrøvini, og síðani fara teir at avhoyra dreingirnar, sum fingu tey. Tann yngsti er 16 ára gamal. Mark Foley verður væntandi eisini avhoyrdur.

Sjónvarpið ABC hevur longu almannakunngjørt innihaldið í nøkrum av teldubrøvunum hjá Foley. Í einum teirra spyr Foley ein av teimum ungu dreingjunum, um teir báðir ikki skulu hittast aftan á arbeiðstíð.

Sakførarin hjá Mark Foley segði í gjár, at politikarin hevði havt trupulleikar við rúsdrekka, og at hann hevði verið ávirkaður, tá hann skrivaði teldubrøvini. Men fólk, sum hava arbeitt saman við Mark Foley, siga við amerikonsku bløðini, at tey hava ongantíð havt varhugan av, at hann drakk.

## STUTT SAGT

### Ómannað flogfar datt niður

Minst eitt fólk doyði, tá eitt ómannað flogfar hjá ES-herdeildunum í Kongo datt niður í høvuðsstaðnum Kinshasa í gjár.

Nógv fólk í Kongo vilja hava teir evropeisku hermenninar av landinum, og tilburðurin í gjár bøtti ikki um umdømið hjá hermonnunum. Tá flogfarið var dottið niður, komu fleiri hundrað fólk saman nærhendis vanlukkustaðnum. Tey róptu ókvæmisorð eftir hermonnunum og kravdu, at teir fóru úr Kongo alt fyri eitt, skrivar AFP.

Talsmenn hjá ES-hermonnunum siga seg ikki vita, hví tað ómannaða flogfarið datt niður. Hetta er annað flogfarið, sum deildirnar hava mist í Kongo. Tað fyrra varð skotið niður í juli.

ES-hermenninir og hermenn hjá ST eru komnir til Kongo at tryggja lóg og landaskil upp undir seinna umfar av forsetavalinum, sum verður seinni í mánaðinum. Valið er tað fyrsta har av sínum slaghi í meiri enn 40 ár.

### Fleiri gávur frá Mærsk

„A.P. Møller og Hustru Chastine Mc-Kinney Møllers fond til almene formaal“ ella Almuefonden, sum hann vanliga verður róptur, er nógv tann størsti grunnurin í Danmark, og fleiri eru tey, sum hava fingið gagn av pengum úr grunninum. Tann størsta gávan, sum grunnurin nakrantíð hevur latið, er tað nýggja operahúsið í Keypmannahavn, sum kostaði 2,6 milliardir krónur.



*Almuefonden hjá A.P. Møller fer ætlandi at lata fleiri stórar gávur í komandi árum*

Nú er líkt til, at grunnurin fer at lata fleiri stórar gávur í framtíðini, skrivar Berlingske Tidende. Grunnurin hevur eisini nóg mikið at lata av. Hann eigur 40 prosent av partabrøvunum í fyritøkuni A.P. Møller-Mærsk, og við dagsins kursum eru tey meiri enn 90 milliardir krónur verd, skrivar blaðið.

– Operahúsið var nakað fyri seg, men tey seinastu árini hevur grunnurin latið fleiri aðrar stórar gávur til ymsar verkætlanir, og tað er einki at ivast í, at hetta fer at halda fram, sigur stjórin í grunninum, Ove Hornby, við Berlingske Tidende.

### Strika skuld fyri umhvørvið

Amerikanska stjórnin hevur gjørt av, at Guatemala skal sleppa undan at rinda pengar, sum landið skyldar amerikanska ríkiskassanum. Tilboðið er kortini ikki ókeypis, tí USA krevur, at Guatemala skal brúka 160 milliónir krónur til umhvørvisvernd afturfyri.

Umboð fyri tær báðar stjórnirnar hava í seinastuni tingast um eina avtalu, sum hevur fingið heitið „skuld fyri umhvørvi“. Amerikanarar hava kravt, at myndugleikarnir í Guatemala skulu seta fleiri umhvørvisverndartiltøk í verk í fýra landspørtum tey næstu 15 árini, og tað hevur stjórnin í Guatemala nú játtað at gera, skrivar AP.

– Nøgvur tropiskur regnskógur er í teimum fýra landspørtunum, og hann skal verjast, segði amerikanski samráðingarleiðarin, Peter Seligmann, tá avtalan bleiv undirskrivað. Hann helt, at avtalan kann vera fyrimynd fyri onnur lond, tí hon er eitt gott dømi um, hvussu umhvørvisvernd kann fremjast í verki, helt hann.